## 95 prosent afrikanarar

Flestu av teimum 9 mió íbúgvunum í Haiti hava afrikanska bakgrund. 95 prosent teirra koma hagani, meðan ein stórur partur av hinum hava europeiska bakgrund. 80 prosent av fólkinum eru katolikkar, 16 prosent protestantar, meðan 4 prosent játta seg til annan ella ongan átrúnað. Mett verður, at umleið helmingurin av fólkinum útinna voodoo. Haiti telist millum londini við størsta mutrinum, sambært Transparency International.



## Einaræði og demokrati

Haiti varð í mong ár í hondunum á einaræðisharrunum Francois Duvalier, vanliga nevndur Papa Doc og Jean-Claude Duvalier, vanliga nevndur Baby Doc. Hetta var ávikavist í árunum 1957 til 1971, og aftur frá 1971 til 1986. Ein tilgongd fram ímóti fólkaræði fekk ein bráðan enda við eitt hernaðarkvett í 1991. Ein sivil stjórn varð sett á stovn í 1994, eftir trýst frá ST og USA. Eitt nýtt kvett varð bart niður í 2001, og í 2004 varð forsetin, Jean-Bertrand Aristide tvungin at fara frá. Verandi forseti, René Préval hevur sitið síðani 2006.



*Forsætisráðharrin í Haiti, Jean-Max Bellerive, hevur sagt við CNN, at talið á deyðum eftir jarðskjálvtan helst er langt oman fyri 100.000. Aðrar keldur meta, at talið á deyðum liggur um eina hálva millión. Men enn er ongin vón um at fáa yvirlit yvir støðuna í rakta økinum, har hundraðtúsundatals fólk ongastaðni hava at fara*

# Haiti hart rakt

**Altjóða Reyði Krossur metir at jarðskjálvtin í Haiti hevur rakt úti við 3 milliónir fólk. Enn er óvist, hvussu nógv fólk hava latið lív. Men tøl millum 100.000 og 500.000 hava verið nevnd.**

NÁTTÚRUVANLUKKA
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Haiti. Meginparturin av høvuðsstaðnum í lítla oyggjalandinum uttan fyri Miðamerikansku strondina fór í sor í týskvøldið kl. 22.53 føroyska tíð. Skjálvtin máldi 7,3 á Richterstiganum og miðdepilin var bert 15 kilometrar frá høvuðsstaðnum Port-au-Prince.

Reyði Krossur metir, at vanlukkan hevur rakt úti við 3 milliónir fólk. Enn er óvist, hvussu nógv fólk hava latið lív. Men tøl millum 100.000 og 500.000 hava verið nevnd.

Vanlukkan er so umfatandi, at hon verður samanborin við flóðalduna í Suðurasia, sum skakaði heimin 2. jóladag 2004. Tá doyðu umleið 230.000 fólk.

### Var væntað

Sambært CNN ávaraðu granskarar longu í 2004 og í 2008 um, at oyggin Hispaniola, sum er tvíbýtt millum Haiti og Dominikanska Lýveldið, kundi verða rakt av einum álvarsligum jarðaskjálvta.

- Hetta er eitt sera virkið og seismiskt virkið øki á jørðini. Tí eigur jarðaskjálvtin ikki at koma óvart á jarðfrøðingar, sigur Jian Lin, jarðfrøðingur á Woods Hole Oceanographic Institution í Massachusetts við CNN.

Hispaniola liggur millum tvær tektoniskar plátur, Norðuramerikansku og Caribisku. Tá pláturnar gnadda móti hvørji aðrari henda jarðskjálvtar. Seinasti stóri skjálvtin á oynni Hispaniola var í 1946. Tá var hann 8,0 á Richterstiganum, og fleiri enn 20.000 fólk vórðu heimleys. Sjálvtin týsdagin var 7,0 á Richter-stiganum. Men av tí, at miðdepilin var so nær høvuðsstaðnum Port-au-Prince, eru avleiðingarnar so umfatandi.

Roknað verður ikki við, at føroyingar eru staddir á Haiti. Eini 10 danir vóru í landinum undir skjálvtanum. Tveir teirra eru ikki funnir enn.

## Føroyar senda hjálp

Uttanríkisráðið hevur gjørt av at lata 150.000 kr. í neyðhjálp til Haiti

Peningurin, sum Føroyar lata til hjálpararbeiði í Haiti, fer gjøgnum Reyða Kross, sum fylgir áheitanum frá altjóða Reyða Krossi um, hvussu peningurin kemur best til gagns.

Uttanríkisráðið hevur spurt seg fyri, um nakar føroyingur er á Haiti. Danska uttanríkisráðið hevur boðað frá, at hvørki avvarðandi ella nakar føroyingur hevur sett seg í samband við tey um vanlukkuna á Haiti.

Avrátt er, at uttanríkisráðið í Føroyum fær fráboðan, um føroyingar eru á Haiti, ella um komið verður fram á nøvn, sum kunnu vera føroysk. Uttanríkisráðið fer at fylgja við støðuni og um so er, at føroyingar eru í vandaøkinum, tekur uttanríkisráðið móti fráboðanum á +298 306100 og á mfa@mfa.fo.